# 1000 grønlendarar sóu Kristinu doyggja

**Báðar sýningarnar hetta vikukskiftið av Polaroid, What's Really Going On Around The Northpole, hava verið fullkomiliga útseldar.**

LEIKLIST
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Yvir 1000 fólk hava longu sæð dansileikin Polaroid, What's Really Going On Around The Northpole, ið hevði frumsýning í Nuuk fríggjakvøldið.

Sum vit áður hava skriva er føroyski yrkisdansarin Kristina Ougaard Sørensen ein av leikarunum. Leikurin er settur upp av norska leikstjóranum og koreografinum Jo Strømgren, ið er ein nógv eftirspurdur og væl dámdur leikstjóri, bæði í og uttanfyri norðurlond. Hetta verður mett at vera størsta grønlendska satsið innan leiklist og dans nakrantíð.

Men satstið tykist at hava eydnast. Sýningarnar í Napa, ið er norðurlandahúsið í Nuuk, hava verið fullomiliga útseldar. Anders Bendtsson leiðari av Napa sigur, at dansileikurin er heilt fantastiskur.

Leikurin fer nú á ferð, og eisini í hinum Norðurlondum er áhugin stórur. M.a. eru fleiri av teimum 4 sýningunum í Operahúsinum í Keypmannahavn longu útseldar. Leikurin vitjar í Norðurlandahúsinum 21. og 22. oktober.

At døma eftir myndunum, ið Napa hevur sent okkum, er talan um ein vakran leik. Men eisini ein leik, har føroyski luttakarin doyr.



*At døma eftir hesi myndini, doyr føroyski luttakarin í grønlendska dansileikinum*




Citizen Dane

## Overstyrmand og 1. Maskinmester – Tankskib

**Du er**
allerede i et tilsvarende job – eller har solid erfaring som juniorofficer/-mester på tank- eller kemikalieskibe. God til engelsk og IT – og du er kendt for din handlekraft og kommunikationsevner.

**Vores værdier er**
pålidelighed, fleksibilitet og empati – og det er også dine, for det kræver stillingen.

**Dampskibsselskabet Norden**
kender du allerede. Vi har i 2006 selv finansieret købet af flere skibe og det bliver vi ved med. Tillige vil kommende udnævnelser af i alt 6 overstyrmænd og 1.maskinmestre medføre, at vi har brug for at ansætte deres afløsere.

**Kvalifikationer**
du har som minimum erfaring fra tjeneste i tank- eller kemikalieskibe. Du har tillige forståelse for de høje kvalitetskrav, der stilles til en et moderne tankskib – og du synes, at det er spændende at løbe efter.

- Du er opdateret med hensyn til obligatoriske kurser på olie- og kemikalie området
- Du har de fornødne certifikater.
- Du er som nævnt god til engelsk – da dette er kommunikationssproget.
- Du er positiv og god til at samarbejde udenlandske kolleger, leverandører og kunder

**Vi tilbyder**
- indflydelse på din hverdag, hvor du som seniorofficer er nøgleperson på et af vore mange tankskibe, der opererer world wide.
- Interessant og krævende arbejdsopgaver i et rederi med god stemning – og vokseværk.
- Aflønning og ansættelsesvilkår på individuelle kontrakter
- Fine uddannelsesmuligheder og indflydelse på det du går og laver.

**Du kan også kontakte**
Senior Crew Manager Søren Dybdahl på tlf. +45 33 42 05 52

Send din ansøgning pr. post eller mail: crew@ds-norden.com

**Dampskibsselskabet "NORDEN" A/S**
Amaliegade 49
DK-1256 København K.
Att. Crew Management

Dampskibsselskabet A/S NORDEN


# Joey Moe til Føroyar



**Heitasta navnið í donskum r'n'b tónleiki spælir komandi vikuskiftið í Eclipse í Havn og Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Síðan fyrstu stakfløguna Flip It (Like A DJ), hevur Joey Moe verið eitt stór navn í Danmark.

Nú kemur Joey Moe til Føroyar.

Hóast bert 20 ár, hevur Joey Moe arbeitt miðvíst við dreyminum um at liva av at syngja pop í 10 ár. Líka síðan, tá 10 ára gamli Joey fyrstu ferð hoyrdi Backstreet Boys, hevur hann arbeitt við hesum. Fyrst í dreingja bólkinum Nothing Special, og síðan sum einstaklingur.

Stakfløgurnar Flip It (Like A DJ) og My Last Serenade hava verið nógv spældar í donskum útvarpi, umframt sjónvarpsstøðunum Voice TV, MTV og sendingini Boogie.

Joey Moe hevur m.a. eisini hita upp fyri Johnny Deluxe á konsertferð teirra í fjør. Hetta var áðrenn fyrsta fløgan Moe Town kom út í mars í ár, fløgan hevur fingið sera góða móttøku í Danmark. Nú fáa føroyingar møguleika at uppliva Joey Moe á konsertunum fríggjakvøldið í Eclipse í Havn og leygarkvøldið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Úr Fuglafirði verður sagt, at bussar koyra úr Havn og Klaksvík til konsertina.

Á Portal.fo undir Kymyndir liggja tvey sjónbandaløg hjá Joey.